# P/F FØROYA LÍVSTRYGGING

P/F-skrás.nr. 2964

## ÁRSROKNSKAPUR OG KONSERNROKNSKAPUR

## 2007

## INNIHALDSYVIRLIT


Síða

Upplýsingar um felagið ........ 2

Ársfrágreiðing ........ 3 - 9

Roknskaparátekning ........ 10

Átekning frá óheftum grannskoðarum ........ 11-12

Nýttur roknskaparháttur ........ 13 - 17

Rakstrarroknskapur 2007 ........ 18 - 19

Fíggjarstøða pr. 31. desember 2007 ........ 20 - 21

Notur ........ 22 -27

Fimm ára yvirlit ........ 28

Lyklatøl ........ 28

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Føroya Lívstrygging |
| Bústaður: | Kopargøta 1, FO-100 Tórshavn |
| Skattakommuna: | 100 Tórshavn |
| Stovningardagur: | 1. januar 2000 |

**Nevnd**
Poul Hansen, formaður
Súsanna Ewaldsdóttir Sørensen, næstformaður
Kitty May Ellefsen
Jógvan Mørkøre
Gunnleivur Dalsgarð

**Stjórn**
Tummas Theodorsson Eliasen

**Fyristøðufólk**
Gunnvør Dam Jensen, tekniskur leiðari
Poul Christoffur Thomassen, fyrisitingarleiðari
Eyðna Justinussen, fíggjar- og roknskaparleiðari

**Aktuarur**
Poul Christoffur Thomassen, cand.act., góðkendur aktuarur

**Tryggingarlækni**
Høgni Debes Joensen, landslækni

**Grannskoðarar**
P/F Grannskoðaravirkið *INPACT*, statsaut. revisorar
Rasmussen & Weihe statsaut. grannskoðarafelag P/F

Ársroknskapurin 2007 er góðkendur á felagsins ársaðalfundi, hin 2. apríl 2008.

_______________
fundarstjóri

**ÁRSFRÁGREIÐING 2007**

Rakstrarúrslitið hjá Føroya Lívstrygging áðrenn bonusútjavning og eginpeningsavkast er 47,8 mió. kr. í mun til eitt hall upp á 47,6 mió. kr. árið frammanundan. Í árinum vóru 42,1 mió. kr. lagdar í bonusútjavningargrunnin, og 36,3 mió. kr. vóru tillutaðar sum kundaogn. Fluttar til bonus eru 78,4 mió. kr. Rakstrarúrslitið upp á 5,0 mió. kr. verður flutt til eginognina, soleiðis at eginognin verður rentað við 6,2% áðrenn skatt. Við árslok var eginognin 95,5 mió. kr. Rentan, ið tryggingartakarin hevur fingið tilskrivað seinastu árini, hevur verið 4,5%. Rentan, ið tryggingartakarin fær tilskrivað í 2008 er sett til 5,0%.

| **Høvuðstøl fyri rakstur** | **Móðurfelag** | | **Konsern** | |
|---|---|---|---|---|
| **DKK t** | **2007** | **2006** | **2007** | **2006** |
| Tryggingargjøld | 288.224 | 255.933 | 288.224 | 255.933 |
| Úrslit av endurtrygging | -6.863 | -10.839 | -6.863 | -10.839 |
| Inntøkur av íløguaktivum netto | 125.895 | 32.312 | 125.895 | 32.312 |
| Tryggingarveitingar | -97.069 | -90.895 | -97.069 | -90.895 |
| Tryggingartekniskar avsetingar | -202.899 | -185.281 | -202.899 | -185.281 |
| Rakstrarútreiðslur | -22.268 | -20.309 | -22.268 | -20.309 |
| Skattur og avgjøld | -1.590 | -824 | -1.400 | -824 |
| Rakstrarúrslit áðrenn bonusútjavning og eginpeningsavkast | 47.753 | -47.595 | 29.340 | -47.595 |
| Rakstrarúrslit áðrenn bonusútjavning, kundaogn og eginpeningsavkast | 84.043 | -19.903 | 62.229 | -19.903 |
| Flutt til bonus tilsamans | 78.430 | 23.800 | 78.430 | 23.800 |
| Flutt til eginogn | 4.998 | 3.897 | 5.188 | 3.897 |

**Tryggingargjøld**

Í 2007 vóru tryggingargjøldini 288,2 mió. kr. Hetta er ein øking upp á 32,3 mió. kr. í mun til 2006, tá tryggingargjøldini vóru 255,9 mió. kr. Í prosentum svarar hendan øking til 12,6, og tað er nakað minni enn árini frammanundan. Seinastu 10 árini eru tryggingargjøldini økt við 16,7% um árið í miðal.

Av tryggingargjøldunum í 2007 vóru sløk 57% inngoldin til kapitaltryggingar. Tað er nakað meira enn í fjør, og gongdin seinastu árini hevur verið, at lutfalsliga meira verður inngoldið til kapitaltryggingar. Av tryggingargjøldunum vóru góð 25 % inngoldin til ratu- og rentutryggingar, meðan sløk 18 % vóru inngoldin til samlagstryggingar.

Við árslok 2007 vóru tilsamans 20.649 persónar tryggjaðir hjá Føroya Lívstrygging. Tað eru gott 800 persónar fleiri enn við árslok 2006, tá ið 19.845 persónar vóru tryggjaðir. 6.223 av teim tryggjaðu við árslok 2007 vóru bert skrásett sum limir í eini samlagstrygging, og 14.426 persónar høvdu eina eftirlønar/lívstrygging. Tað eru 831 persónar fleiri enn við árslok 2006. Miðaltryggingargjaldið fyri virknar tryggingar í 2007 var 25.051 kr.

**Endurtrygging**

Endurtryggingargjøld netto vóru nakað minni í 2007 enn í 2006, men endurtryggingarans partur av tryggingarveitingunum við deyða og hættisligari sjúku er øktur úr 2,4 mió. kr. í 2006 til 5,2 mió. kr. í 2007. Úrslitið av endurtrygging tilsamans var í farna ári ein nettoútreiðsla upp á 6,9 mió. kr. mótvegis 10,8 mió. kr. í 2006. Talan hevur verið um eina góða skaðagongd í farna ári, men eisini yvir eitt longri áramál hevur skaðagongdin verið góð. Av teirri orsøk fáa tryggingartakararnir ein avsláttur upp á 25% av váðatryggingargjaldinum við óarbeiðsføri og 30 % av váðatryggingargjaldinum við deyða.

**Tryggingarveitingar**

Í mun til 2006 øktust tryggingarveitingarnar í farna ári við 6,8% og eru nú 97,1 mió. kr. Útgoldnar veitingar í sambandi við deyða vóru minni í 2007 enn í 2006, men harafturímóti eru veitingarnar í sambandi við hættisliga sjúku nærum tvífaldaðar og eru nú 3,5 mió. kr. Útgjaldið fyri virknar tryggingar í 2007 var 21,2 mió. kr., og tað er á leið tað sama sum í 2006. Afturkeyp av tryggingum øktist í mun til 2006 úr 5,7 mió. kr. til 10,1 mió. kr.

Viðvíkjandi samlagstryggingum verður bonus tilroknað í mun til, hvussu skaðagongdin hevur verið í árinum. Bonus á samlagstrygging var 20,9 mió. kr. í 2007, og tað er ein øking upp á 2,2 mió.kr. í mun til árið frammanundan.

**Rakstrarútreiðslur**

Rakstrarútreiðslurnar av tryggingarvirkseminum vóru í árinum 22,3 mió. kr., sum er ein øking upp á slakar 2,0 mió. kr. í mun til 2006. Vøksturin stavar serliga frá øktum útreiðslum til lønir, eftirlønir og ómaksløn, men eisini frá øking í fyrisitingarútreiðslum. Í 2007 var talið á starvsfólkum, umroknað til fulla tíð 28 í tali. Síðan 2000 eru rakstrarútreiðslurnar av tryggingarvirksemi øktar við 5% um árið í miðal, men vøksturin í tryggingargjøldunum hevur í sama tíðarskeiði verið 14% um árið í miðal og tí kann Føroya Lívstrygging aftur lækka umsitingargjaldið.

**Fíggjarvirksemi 2007**

Í árinum vóru fíggjarinntøkurnar hjá móðurfelagnum 135,4 mió. kr. í mun til 39,8 mió. kr. í 2006. Í miðal svarar hetta til eitt avkast upp á 6,1% eftir rentuavdekking. Samanborið við avkastið hjá donskum tryggingar-

og eftirlønarfeløgum er tað eitt rættiliga gott avkast. Áðrenn rentuavdekking var avkastið 5,3%. Við árslok 2007 var virðið á íløguognum tilsamans 2,4 mia. kr. í mun til 2,1 mia. kr. við árslok 2006.

Í 2007 vóru fíggjarmarknaðirnir fyrru helvt av árinum merktir av rentuhækkingum, vøkstri og óttanum fyri inflatión, meðan annað hálvár var merkt av órógv. Høvuðsorsøkin til órógv á fíggjarmarknaðinum hevur verið knýtt at subprimekreppuni á íbúðarmarknaðinum í USA, sum hevur víst seg at verið meira umfatandi enn fyrst mett. Hendan órógv flutti seg eisini til at seta sín dám á partabrævamarknaðin, sum hóast tað vísti eitt gott avkast fram til síðsta ársfjórðing í 2007, tá ið partabrøvini sum heild fullu nógv í virði. Serstakliga vóru tað partabrøv knýtt at fíggjarvinnuni, sum fullu munandi í virði.

Orsaka av fíggjarkreppuni valdu nógvir íleggjarar í seinnu helvt av árinum at venda sær móti tryggum íløgum, serliga statslánsbrøvum. Tað hevði við sær, at rentan fall serliga á amerikanska lánsbrævamarknaðinum. Gjøgnum árið 2007 fullu renturnar á 2-ára lánsbrøvum úr 4,9% til 3,3%. 10-ára rentan fall tó bert frá 4,8% til 4,3%. Orsøkin til at 10-ára renturnar ikki fullu líka nógv sum 2-ára renturnar, var at inflatiónin framvegis øktist. Gongdin í Evropa hevur verið nakað øðrvísi í 2007, har tað framvegis hevur verið góður búskaparvøkstur. Tann evropeiski lánsbrævamarknaðurin varð tó raktur av fíggjarligu kreppuni í seinna hálvári, tá ið renturnar eisini byrjaðu at falla. Í 2007 fall 2-ára lánsbrævarentan úr 4,1% til 4,0%, meðan 10-ára lánsbrævarentan øktist frá 4,0% til 4,3%. Orsaka av óttanum fyri inflatión broytti Evropeiski Miðbankin í fyrra hálvári stuttu rentuna úr 3,5% til 4,0%. Heldur ikki tann danski lánsbrævamarknaðurin slapp undan ávirkanini úr USA. Gongdin har var næstan meinlík gondgini í Evropa annars. 2-ára lánsbrævarentan øktist úr 3,9% til 4,2%, meðan 10-ára rentan øktist úr 3,9% til 4,5%. Danski Tjóðbankin valdi eisini at broyta tað stuttu rentuna úr 3,57% til 4,25%.

Gongdin á altjóða partabrævamarknaðinum í 2007 var merkt av fíggjarligu kreppuni. Árið byrjaði við góðum avkasti av partabrøvum, meðan annað hálvár var merkt av kreppuni, minkandi búskaparvøkstri í USA og príshækking á olju, sum tilsaman ávirkaði fallandi virðið á partabrøvum. Evropeiski partabrævamarknaðurin varð merktur av fíggjarkreppuni, men tó ikki í sama mun. Tann danski partabrævamarknaðurin var alt árið merktur av sveiggjum í kursvirðinum, tó serliga í seinasta ársfjórðingi, tá partabrævakursirnir fullu nógv.

1,5 mia. kr. ella 63,5% av íløguognum felagsins eru lánsbrøv. Lutfalsliga er hetta eitt sindur minni enn í 2007, tá ið lánsbrøvini vóru oman fyri 70% av íløguognum. Av hesum eru meginparturin stats- og realkreditlánsbrøv, og ein minni partur er vinnulánsbrøv. Rentuvinningurin av lánsbrøvum í 2007 var 68,3 mió. kr., meðan kurstapið av lánsbrøvum var 46,3 mió. kr. Avkastið av lánsbrøvum í farna ári var 22,0 mió. kr., sum svarar til eitt avkast upp á 1,5%.

Ein partur av íløguætlan felagsins er, at umleið 25 % av fíggjarognunum eru partabrøv. Á leið 63% av fíggjarognunum eru lánsbrøv og fyri at minka um váðan hevur felagið keypt ein rentuavdekning av lánsbrøvum, sum við árslok 2007 hevði eitt virði upp á 18,6 mió. kr. Í árinum tók hesin rentuavdekningur 40 % av kurstapinum.

Í 2006 vóru íløgurnar í partabrøv øktar munandi. Við árslok 2007 vóru íløgurnar í partabrøv 534,7 mió. kr., og í mun til árslok 2006 er hetta ein øking upp á 59,7 mió. kr. Lutfalsliga eru partabrøvini tó á sama støði sum við árslok 2006, nevniliga á leið 22%. Vinningsbýtið av partabrøvum í farna ári var 7,1 mió. kr., meðan kursreguleringin av partabrøvum var 79,4 mió. kr. Eftir gjaldoyraregulering var vinningurin av partabrøvunum 70,8 mió. kr. Tað svarar til, at partabrøvini í 2007 góðu eitt avkast upp á 15,1%.

Meðan innlánini við árslok 2006 vóru 77,2 mió. kr. svarandi til 3,6% av íløguognum felagsins, vóru innlánini 200,5 mió. kr. ella 8,3% av íløguognunum við árslok 2007. Orsøkin til øktu innlánini er gongdin á partabræva- og fíggjarmarknaðunum í seinnu helvt av farna ári. Vinningurin av partabrøvum í atknýttum felag var í 2007 16,8 mió. kr. áðrenn skatt. Hetta svarar til, at avkastið av partabrøvunum hevur verið 47,3%.

| **Móðurfelagið** | | | **Vinningur í 2007** | |
|---|---|---|---|---|
| **DKK t** | **2007** | **2006** | **í Kr.** | **í %** |
| Fastogn | 24.013 | 24.220 | 706 | 3,0% |
| Partabrøv í atknýttum felag | 65.884 | 22.092 | 16.820 | 47,3% |
| Partabrøv í assosiereaðum felag | 4.500 | 3.000 | - | 0,0% |
| Partabrøv | 534.697 | 474.985 | 70.784 | 15,1% |
| Lánsbrøv | 1.535.074 | 1.515.480 | 22.003 | 1,5% |
| Útlán | 28.835 | 24.412 | 1.384 | 5,3% |
| Innlán | 200.479 | 77.174 | 5.126 | 3,8% |
| Íløgugongd áðrenn rentuavdekking | 2.393.482 | 2.141.363 | 116.824 | 5,3% |
| Rentuavdekningur | 24.447 | 169 | 18.564 | |
| Íløguognir tilsamans | 2.417.929 | 2.141.532 | 135.388 | 6,1% |

**Íløgufelagið Royndin**

Endamálið hjá íløgufelagnum Royndini er, sum framtaksfelag, at gera íløgur í føroyskt vinnuvirksemi. Í árinum hevur felagið gjørt íløgur í 9 ymisk feløg fyri tilsamans 29,0 mió. kr. Royndin hevur í árinum selt partabrøv fyri 3,5 mió. kr. við einum kursvinningi upp á 17,5 mió. kr. Harumframt hevur felagið havt rentuinntøkur av innistandandi peningi upp á 12,7 t. kr. Tilsamans hava fíggjarinntøkurnar verið 17,5 mió.

kr. Útreiðslurnar hjá felagnum í 2007 vóru slakar 700 t. kr. umframt skatt á 3,0 mió. kr., og harvið var rakstrarúrslitið 13,8 mió. kr. í mun til 2,1 mió. kr í 2006.

Árið 2007 er 2. roknskaparár hjá Royndini, og higartil hevur gingið væl. Stuttfreistað kann væntast, at avkastið av íløgunum verður ávirkað av sveiggjum í vinnuni. Framtakskapitalur er tó tolin kapitalur, og dentur verður lagdur á at fáa eitt gott avkast yvir eitt longri áramál.

**Kundaogn**

Kundaogn er yvirrenta, renta av bonustiltaki umframt afturbering av avísum tryggingargjøldum. Hetta hevur higartil verið tilskrivað sum bonus, men verður nú tilskrivað á konto tryggingartakarans sum kundaogn. Kundaognin við árslok 2007 er 64,0 mió. kr., og fær kundin tilskrivaða somu rentu sum eginognin umframt 3,5% stig.

**Kapitalstyrki**

Í 2007 var kapitalstyrki felagsins tilsamans 181,9 mió. kr., og í mun til 2006 er hetta ein øking upp á 71,9 mió. kr. Hendan broyting stavar serliga frá eini øking í kundaogn upp á 36,3 mió. kr. og at í bonusútjavningargrunninum nú eru 42,1 mió. kr. meira.

| **Kapitalstyrki<br>Mió.kr.** | **2007** | **2006** |
|---|---|---|
| Partapeningur | 0,5 | 0,5 |
| Tiltaksgrunnur | 95,0 | 90,0 |
| Kundaogn | 64,0 | 27,7 |
| Ábyrgdarpeningur | 25,0 | 25,0 |
| **Fæfeingisgrundarlag** | **184,5** | **143,2** |
| Solvenskrav | 104,5 | 93,0 |
| **Fæfeingisgrundarlag eftir solvenskrav** | **80,0** | **50,2** |
| Bonusútjavningargrunnur | 101,9 | 59,8 |
| **Kapitalstyrki tilsamans** | **181,9** | **110,0** |

**Umboð fyri tryggingartakararnar**

Umboðini fyri tryggingartakararnar eru tey, sum vóru vald millum tryggingartakararnar á sumri 2005. Umboðini eru Jógvan Mørkøre, samfelagsgranskari, Palli Petersen, verkfrøðingur, Andrias Ziska, deildarleiðari, Gunnleivur Dalsgarð, fakfelagsformaður og Leif Ellingsgaard, sýnsmaður. Í 2006 vóru tveir av limunum í umboðsráðnum valdir í nevndina fyri Føroya Lívstrygging. Teir eru Gunnleivur Dalsgarð og Jógvan Mørkøre.

**Útlitini fyri 2008**

Vit meta, at vøksturin í tryggingargjøldunum verður á leið tann sami sum í 2007. Meginparturin av tryggingargjøldunum stavar frá eftirlønarskipanum hjá fakfeløgum og virkjum, og tískil er vøksturin í tryggingargjøldum knýttur at gongdini á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Í 2007 vóru fíggjarmarknaðirnir merktir av fyrst rentuhækkingum, vøkstri og óttanum fyri inflatión og seinni av rentulækkingum og kursfalli á partabrøvum. Evropeiski Miðbankin metir framvegis, at inflatión hóttir, men samstundis at búskaparligi vøksturin er í minking. Tá ið Miðbankin leggur størsta dentin á at tálma inflatiónini er hugsandi, at Evropeiski Miðbankin ikki broytir rentuna fyribils, men í mun til gongdina kann ein møgulig rentulækking koma uppá tal seinni í 2008. Væntandi fara partabrøvini ikki at hækka í virði, sum tey hava gjørt til seinasta ársfjórðing 2007, men hóast stórt fall í partabrævakursum í fyrsta ársfjórðingi 2008 vænta vit tó at partabrøvini geva eitt positivt avkast í 2008. Útlitini fyri 2008 eru ikki eins góð samanborið við ársbyrjan 2007, men vit vætna tó at ársúrslitið verður á leið tað sama sum í 2007.

**Eigaraviðurskifti**

Í yvirlitinum sambært §28b í partafelagslógini er landskassin skrásettur sum partaeigari.

**Konsernviðurskifti**

P/F Føroya Lívstrygging eigur 100% av partapeninginum í P/F Royndin, sum er við í móður- og konsernroknskapinum. Felagið er tikið við eftir innanvirðisháttinum.

Harafturat eiga konsolideraðu feløgini partapening í hesum feløgum, ið eru upptikin sum assosierað feløg:

| | |
|---|---|
| P/F Skálafjarðartunnilin | 50,00% |
| P/F Aluplast | 48,78% |
| P/F Simprentis | 20,83% |
| P/F Bitland | 21,74% |
| Spf. 4. September 1975 | 40,00% |

Feløgini eru tikin við til útveganarvirðið. Hetta er grundað í praktiskum orsøkum. Munurin millum innanvirðisháttin og útveganarvirðið hevur ikki týdning fyri metingina av árs- og konsernroknskapin hjá P/F Føroya Lívstrygging.

**Býti av ársúrslitinum**

Mælt verður til, at ársúrslitið fyri roknskaparárið 2007 á 5,0 mió. kr. verður býtt soleiðis:

| | |
|---|---|
| Tiltaksgrunnur við ársbyrjan | 87.914 t.kr. |
| Ársúrslit | 4.998 t.kr. |
| Flutt í tiltaksgrunn eftir innanvirðisháttinum | -13.792 t.kr. |
| Tiltaksgrunnur við ársenda | 79.119 t.kr. |

ið nevndin mælir til at flyta fram til komandi ár.

**Hendingar aftan á roknskaparárslok**

Tað eru ongar hendingar farnar fram síðan roknskaparárslok, sum ávirka árs- og konsernroknskapin fyri 2007.

**Etisk atlit**

Arbeitt verður við at dagføra íløguætlanir felagsins, soleiðis at etisk atlit verða tikin við í samband við íløguvirksemi.

**ROKNSKAPARÁTEKNING**

Leiðsla og nevnd hava í dag gjøgnumgingið og góðkent árs- og konsernroknskapin hjá P/F Føroya Lívstrygging fyri roknskaparárið 1. januar 2007 til 31. desember 2007.

Árs- og konsernroknskapurin er uppsettur sambært lóg um tryggingarvirksemi.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi soleiðis, at árs- og konsernroknskapurin gevur rætta mynd av fíggjarligu støðuni hjá felagnum og konsernini tann 31. desember 2007, og av virkseminum hjá felagnum og konsernini í roknskaparárinum 1. januar 2007 til 31. desember 2007

Tórshavn, hin 2. apríl 2008

| | | |
|---|---|---|
| Stjórn: | Tummas T. Eliasen<br>stjóri | |
| Nevnd: | Poul Hansen<br>nevndarformaður | Súsanna E. Sørensen |
| | Kitty May Ellefsen | Jógvan Mørkøre |
| | Gunnleivur Dalsgarð | |

**ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARUM**

**Til partaeigararnar í P/F Føroya Lívstrygging**

Vit hava grannskoðað árs- og konsernroknskapin hjá P/F Føroya Lívstrygging fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2007. Árs- og konsernroknskapurin er gjørdur eftir lóg um tryggingarvirksemi.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at árs- og konsernroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagana ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2007 og av úrslitinum av virksemi felagana í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2007 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Tórshavn, hin 2. apríl 2008

| | | | |
|---|---|---|---|
| **P/F Grannskoðaravirkið *INPACT*** | | **Rasmussen & Weihe** | |
| statsaut. revisorar | | statsaut. grannskoðarafelag P/F | |
| Jógvan Amonsson | Heini Thomsen | Hans Laksá | Joen Magnus Lamhauge |
| statsaut. revisor | løgg. grannskoðari | statsaut. revisor | reg. revisor |

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Roknskapurin fyri P/F Føroya Lívstrygging er gjørdur sambært viðtøkum felagsins og tryggingarlóggávuni og eftir teimum krøvum, sum konsessiónin setur viðvíkjandi teimum tryggingarteknisku útrokningunum. Somuleiðis er dentur lagdur á at fylgja góðum roknskaparsiði.

Roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

## KONSERNROKNSKAPUR

Móður- og konsernroknskapurin er uppsettur eftir innanvirðishættinum.

Konsernroknskapurin vísir móðurfelagið og dótturfeløgini undir einum. Allir innanhýsis handlar og millumverandi, eins og konserninnanhýsis kapitalpartar, eru eliminera∂ir.

Inntøkur og kostnaður frá kapitalpørtum eru upptikin í móðurfelagsroknskapin eftir úrsliti, áðrenn skatt, í dótturfeløgunum. Skattur í móður- og dótturfeløgunum er hereftir kostnaðarførdur í móðurfelagnum.

Ársúrslitið, áðrenn skatt, vísir hereftir úrslitini, áðrenn skatt í øllum atknýttu feløgunum.

Inntøkur frá assosieraðum feløgum eru upptiknar eftir ognarpartinum av ársúrslitinum og eginpeninginum.

Kapitalpartar, undir fíggjarligari støðisogn, vísa ognarpartarnar í atknýttum og assosieraðum feløgum til innara virði. Um eginognin er negativ verður niðurskrivað til kr. 0, og upphæddin verður avsett undir skyldum, í tann mun móðurfelagið heftir fyri skuldini.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Tryggingarvirksemi

Tryggingargjøldini fata um tey skuldskrivaðu tryggingargjøldini. Tey verða tíðaravmarkað undir tryggingartekniskum avsetingum soleiðis, at tey fata um roknskaparárið.

Umframt hetta eru tryggingargjøldini tíðaravmarkað á tann hátt, at inngjøld fyri tryggingar, sum ikki eru endaliga stovnaðar, men hoyra við til roknskaparárið, eru tikin við í hesum roknskapi.

Endurtryggingargjøldini verða goldin sambært avtalum við endurtryggingarfeløg, og verður hetta virksemið árliga javnað í sambandi við uppgerð av endurtryggingargjaldinum.

Tryggingarveitingarnar fata um veitingar í roknskaparárinum, og endurtryggjaranna partur er drigin frá.

**Fíggjarvirksemi**

Fíggjarinntøkurnar fata um rakstur av fastognum, rentur, vinningsbýti, staðfestan kursvinning og -tap og virðisjavnan av fíggjaríløgum pr. 31.12.2007.

**Gjaldoyra**

Transaktiónir í fremmandum gjaldoyra verða leypandi bókaðar til tann kurs, ið goldið verður til. Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verða virðisásettar til kursin á degnum fyri fíggjarstøðuna.

**OGN**

**Fíggjarognir**

Børsskrásett virðisbrøv eru virðisásett til marknaðarvirði og onnur virðisbrøv til útveganarvirði. Rentuavdekningar verða innroknaðir í fíggjarstøðuna til keypsvirði og verða síðani virðisásett til marknaðarvirði. Innlán eru virðisásett til áljóðandi virði við ársenda, og innlán í fremmandum gjaldoyra eru virðisásett til kursin við ársenda. Virðisjavnan er førd yvir raksturin.

Útlán eru virðisásett sum restvirðið við ársenda. Avsett er móti tapi svarandi til tann metta tapsvandan grundað á eina gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum láni.

**Fastar ognir, rakstrargøgn og onnur ogn**

Fastognir verða avskrivaðar javnt yvir 50 ár. Leiðsla felagsins hevur við árslok 2006 valt at uppskrivað bygningarnar til eitt mett dagsvirði. Uppskrivingin er førd yvir raksturin. Uppskrivaða virði verður grundarlagið undir avskrivingunum komandi árini.

Onnur rakstrargøgn eru tikin við til útveganarvirðið. Innbúgv verður avskrivað yvir 10 ár, og telduútgerð og annar telduútbúnaður verður avskrivaður yvir 3-5 ár.
Íløgur undir kr. 10.000 verða útreiðsluførdar.

## SKYLDUR

### Tryggingartekniskar avsetingar

Tær eru gjørdar upp samsvarandi tekniska grundarlagi felagsins og eru góðkendar av ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi felagsins. Útrokningarnar byggja á tryggingarfrøðiligar mannagongdir, ið eru grundaðar á best møguligar metingar um livialdur, vanda fyri avlamni og øðrum tryggingarfrøðiligum váðum.

### Aktuellar og eventuellar tryggingar

Lívstryggingartekniskar avsetingar umfata bundnar veitingar eftir tí grundarlagsrentu, sum er veitt tryggingartakarunum. Tryggingar, sum eru teknaðar fram til 1/1-2000 hava 4,25% og 4,5% í grundarlagsrentu, og hava hesar tryggingar landskassaveðhald. Tryggingar, ið er teknaðar síðan 1/1-2000 hava 2,5% í grundarlagsrentu og hava ikki landskassaveðhald.

Tær bundnu veitingarnar eru gjørdar upp sum nútíðarvirðið av teimum veitingum, ið felagið hevur bundið seg til at veita tryggingartakarunum og nútíðarvirðinum av mettum framtíðar kostnaði av at umsita tryggingarnar við frádrátti av nútíðarvirðinum av framtíðar inngjøldum.

### Tíðaravmarkingar

Tryggingargjøld verða tíðaravmarkað soleiðis, at tey samsvara við roknskaparskeiðið, og verður hetta javnað yvir postin "Yvirflutt tryggingargjald". Harumframt verður avsett í roknskapinum, undir postinum tíðaravmarkaði tryggingargjøld, ein upphædd svarandi til tryggingargjøld, ið eru inngoldin meira enn skuldskrivað er, vegna tað, at tryggingar umsitingarliga ikki eru dagførdar um ársskiftið.

### Samlagstryggingar

Tær verða gjørdar upp grundað á metingar av vanda fyri skaðum. Avsett verður ein lutfalsligur partur av árligum tryggingargjaldi.

### IBNR-tiltak

Eins og byrjað varð í 2004 hevur felagið í ár avsett eitt sokallað IBNR-tiltak. Hetta er ein avseting grundað á tað sjónarmið, at tað eru skaðar um ársskiftið, sum ikki eru fráboðaðir felagnum fyrr enn eftir roknskaparlok, men við afturvirkandi gildi. Avsett verður ein lutfalsligur partur av teimum árligu gjøldunum, ið tryggingartakararnir rinda fyri deyð og avlamni.

**Kundaogn/Bonusgrunnar**

Um samlaða rentan, ið felagið veitir tryggingartakarunum er størri enn grundarlagsrentan, hevur munurin higartil verið tilskrivaður sum bonus, men verður frá 2006 tilskrivað sum kundaogn. Afturberingar av ávísum tryggingargjøldum hava higartil verið goldnar tryggingartakarunum sum bonus, men verða frá 2006 goldnar sum kundaogn. Slíkar afturberingar umfata m.a. partar av umsitingargjaldi (byrjað í 2004) og afturbering av kostnaði fyri ymsar veitingar, har kostnaðurin sambært tekniska grundarlagnum er ov varisliga ásettur.

Kundaogn er ein partur av grundkapitalinum á jøvnum føti við eginognina, men verður eftir einum ávísum tíðarskeiði luta teimum tryggjaðu og er tískil ein partur av teimum tryggingartekniskur avsetingunum.

**Kundaogn/Bonusgrunnar umfata**

1. Rentubonus, ið er tilskrivað renta, tá ið samlaða rentan er hægri enn grundarlagsrentan.
2. Váðabonus, ið er afturbering av kostnaði fyri ymiskar veitingar við deyð og við óarbeiðsføri.
3. Umsitingarbonus, ið er afturbering av umsitingargjaldi.
4. Bonus til samlagstryggingar, ið er afturbering av tryggingargjaldi fyri samlagstryggingar grundað á skaðagongdina. Hetta bonus verður útgoldið árliga.

Í bonusgrunninum er alt tað bonus, sum tryggingartakararnir hava spart upp higartil. Í bonusgrunninum fyri samlagstryggingar er afturbering av samlagstryggingargjaldi fyri árið, sum verður útgoldið eftir árslok.

**Bonusútjavningargrunnur**

Á hvørjum ári verður ársúrslitið, eftir avseting til kundaogn, býtt millum tryggingartakarar og partaeigarar, og parturin hjá tryggingartakarunum verður lagdur í bonusútjavningargrunnin. Sostatt er bonusútjavningargrunnurin felags áogn hjá øllum tryggingartakarunum.

**Tiltaksviðurgjald**

Hesin postur umfatar staðfestar, men ikki útgoldnar tryggingarveitingar.

**Kapitaliserað umsitingargjald**

Hesin postur er ein aktivering av teimum útreiðslum, sum eru av at vinna inntøkurnar, og har lagt er upp fyri hesum útreiðslum við at taka umsitingargjald av inngjøldunum. Hetta er grundað á tað sjónarmið, at útreiðslur í einum ári geva inntøkur mong ár framyvir. Árliga verður avsett partar av nýtekningarútreiðslum sambært metingum hjá tryggingarfrøðingi felagsins.

**Skattur**

Skattskylduga inntøkan verður uppgjørd sambært galdandi skattalóggávu. Skatturin verður útreiðsluførdur og avsettur sum skyldugur í ársroknskapinum. Eventualskattur verður avsettur og útreiðsluførdur. Eventualskatturin verður roknaður sum skattur av muninum millum roknskaparlig virði og skattlig virði. Í sambandi við virðisbrøv nýtir felagið lagurprinsippið.

**Áogn**

Áognin er upptikin í ársroknskapinum til áljóðandi virði.

**Eventual- og veðhaldsskyldur**

Eventual- og veðhaldsskyldur verða upplýstar fyri seg tá slíkar eru.

**RAKSTRARROKNSKAPUR 2007**

| | Nota | *Móðirfelagið* 2007 | DKK t 2006 | *Konsernin* 2007 | DKK t 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tryggingargjøld** | | | | | |
| **Tryggingargjøld brutto** | 1 | **288.223.682** | **255.933** | 288.223.682 | **255.933** |
